# Frágreiðing frá ráðstevnu í Bergen
# 23. – 25. sep. 2021

Árliga ráðstevnan hjá etisku nevndunum (Nordic meeting of Ethics Boards) varð í ár hildin í Bergen. Tvey umboð fyri siðfrøðinevndina hjá Føroyskum Sálarfrøðingum luttóku. Umboðini vóru Rigmor N. Arge og Ásvør Skaalum.

Londini, ið vóru umboða á fundinum vóru Svøríki, Finland, Ísland, Danmark, Føroyar og Noreg, sum var vertur.

Hendan frágreiðing sigur frá teimum evnum, sum vóru viðgjørd á fundunum og hvørjir siðfrøðiligir spurningar, vóru viðgjørdir.

Hesi evnir vóru á skrá til fundin:

1. Broytingar í norðurlendsku leiðreglunum (EPNP)
2. Formligar tilgongdir/vegleiðingar til at viðgera klagur.
3. Samskiftisætlanir og tiltøk fyri at økja um ognarskap hjá limum av siðareglunum hjá norðurlendskum sálarfrøðingum (Ethical Principles of Nordic Psychologist)
4. Hvussu kunnu vit viðvirka til, at økja tilvit um siðsemi og stuðla kjak um siðsemi millum sálarfrøðingar?
5. Eru norðurlendsku leiðreglurnar (EPNP) ov ógreiðar og abstraktar til at vera til hjálp í ávísum fakligum samanhangi?

Fundurin var skipaður bæði við uppleggum og við hugleiðingum, umframt kjakið í bólki og plenum.

**Skráin fyri 1. dagin**:

1. Presentatión
2. Broytingar í EPNP
3. Viðgerð av klagum um etiskar spurningar.

Fyrst á skránni aftaná stutta presentatión, vóru broytingar, sum eru gjørdar í siðsemis leiðreglunum fyri norðurlendskar sálarfrøðingar - EPNP ”Ethical Principles for Nordic Psychologist”.

Siðsemisnevndirnar í norðanlondum hava fingið til uppgávu, at endurskoða seinastu úgávuna av leiðreglunum, so hon er meira í tráð við ”meta code of ethics” hjá EFPA (European Federation of psychologist association). Samstundis hevur verið tikið atlit til at gera orðingarnar í EPNP meiri greiðar. Broytingaruppskotið er sent út til norðurlensku nevndirnar til viðmerkingar og góðkenningar. Aðalfundurin í einstøku feløgunum eru avgerðartakandi í mun til broytingarnar.

Bert danska nevndin hevur havt aðalfund og viðgjørt broytingarnar í EPNP, sum vóru góðtiknar á aðalfundinum. Ísland, Føroyar og Finnland hava ikki tikið hetta broytingaruppskot upp til viðgerðar, meðan Noreg og Svøríki ikki hava havt aðalfund. Væntandi verður  broytingarnar í EFPA liðugt viðgjørdur í øllum norðurlendskum nevndunum í 2022.Tann lidna útgávan væntast at koma í gildi í øllum norðurlondum, tá tær eru viðgjørdar og góðkendar.

Annað punkt á skránni varð eitt av evninum sum vóru komin til fundin.

**Hvat eru tær formligu tilgongdinar, sum vera nýttar at viðgera klagur í teimum ymisku norðanlondunum?**

Nevndirna høvdu framløgur um hvørjar tilgongdir eru nýttar til viðgerð av klagum, sum koma til siðsemisnevndinar. (sí skriv um manngaondir hjá einstøku londunum)

Viðgerðartilgongdirnar eru ymiskar frá landi til land, har Finnland og Noreg hava drúgvar formligar tilgongdir, meðan Svøríki hevur skjótar ikki formligar tilgongdir.

Í kjakinum var spurningur settur, hvat er málið við viðgerð av klagum og hvørjar klagur eru av etiskum slag og hvørjar  eru rættarligar.

Tað er ymiskt, hvussu sjálvstøðugt siðsemisnevndirnar arbeiða við etiskum klagum, ella hvørt høvuðsnevndirnar í feløgunum hava hoyringar- og avgerðarrætt.

Hugsanin í øllum etisku nevndunum er tann, at refleksion og dialogur er meira umráðandi fyri at fáa læring av klagum, enn at finna eina passandi fylgju av klaguni.

**Skráin fyri 2. dagin**

1. Framhald av tilgongd um klagur
2. Samskiftisætlan og tiltøk fyri at økja um ognarskap hjá limum av siðareglum hjá norðurlendskum sálarfrøðingum.
3. Hvusssu kunnu vit økja um tilvit um siðsemi og stuðla kjak um siðsemi millum sálarfrøðingar.
4. Eru norðurlendsku leiðreglurnar ov ógreiðar og abstraktar, til at vera til hjálp í ávísum fakligum samanhangi?

1. **Tilgongd um klagur**

   Dagurin byrjaði við, at taka samanum í mun til formligar tilgongdir til at viðgera klagur. Skipanin Noregi og í Svøríki eru tær sum víkja mest frá hvørjari aðrari. Tað sum eisini eyðkennir ymiskleikan er at etisku nevndirnar hava ymiskar heimildir, ymiskar politiskar skipanir og krøv. Arbeiði hjá norsku siðsemisnevndini er bundi at politiskum og lógarbundum krøvum og harvið blíva broytingar torførar og tíðarkrevjandi.

   Tær norðurlendsku siðsemisnevndirnar eru samdar um at refleksion, dialogur og læring er umráðandi í viðgerð av klagum. Men eru ikki á sama málið, tá talan er um í hvønn mun, nevndirnar skulu hava heimild til at handhevja reglurnar í EPNP um virðing, integritet, førleikar og ábyrgd, har klagur kunnu geva fylgur fyri klagaðar sálarfrøðingar og møguleikar fyri útihýsing frá felagnum.

   Hugleitt var um tann ótta og skomm sum kann fylgja við, tá sálarfrøðingar fáa klagur, samstundis við at klagarin skal kenna virðing og at vera tikin í álvara. Tó er umráðandi at talan ikki bert verður um sanktiónir, men at læring eisini verður ein partur av tilgongdini. Haumframt kann ein slík tilgongd vera viðgerandi fyri bæði klient og sálarfrøðing.

   Onnur hugleiðing er, at etikkur ikki bert er talan um einstakar sálrfrøðingar, men eisini kann siga nakað um útbúgvingina, fakligheit sum heild ella hugburð í fakinum. Tí er umráðandi at klagur vera sæddar í størri frásjón.

Ì minni bólkum var tosa um evnini:

2. **Samskiftisætlanir, fyri at økja um ognarskap hjá limum av siðareglum hjá norðurlendskum sálarfrøðingum.**

Her varð víst á ítøkiligar møguleikar fyri at náa limum í feløgunum.

a. Telefonráðgeving
b. Hægri lærustovnar – undirvísa og hugleiða, sameina siðfrøði og gransking
c. Aðalnevndin kunnar um etisku nevnd og møguleikar fyri kunning og ráðgeving
d. Út á arbeiðspláss at seta kjak í gongd um siðfrøðilig evnir.
e. Work shop

**3. Hvussu kunnu vit viðvirka til at økja tilvit um siðsemi og stuðla kjak um siðsemi millum sálarfrøðingar?**

a. Casetilfar og survey fyri at upplýsa um etiskar avbjóðingar millum sálarfrøðingum – online reflektiónstilfar
b. Fasta klummu í fakbløðum
c. Fundarfrágreiðingar frá siðsemisnevnd sendar út til limir
d. Supervisorar og leiðarar hildin varug við siðfrøðiliga ábyrgd

**4. Eru norðurlendsku leiðreglurnar ov ógreiðar og abstraktar til at vera til hjálp í ávísum fakligum samanhangi?**

Úr Finlandi og Svøríki bleiv ført fram, at tað støðugt bleiv gjørt vart við at norðurlensku siðsemisleiðreglurnar eru ov ógreiðar til at vera stuðlandi í mun til sálarfrøðiligt arbeiða. Her var serliga talan um rættarsálarfrøðingar, sum ikki kendu seg nóg væl vegleidda út frá leiðreglunum. Í Finlandi hevur etiska nevndin útarbeitt serliga leiðreglur fyri, hvussu sálarfrøðingur kann meta um sína etisku tilgongd til sítt arbeiði út frá einum “code of conduct”, sum er nýtt í USA. Kjakast var í bólkinum um, hví serliga rættarsálarfrøðingar eftirlysa atferðarreglur fyri etiskar tvístøður? Um tað er tað serliga í teirra arbeiðsstøðu, sum ávirkar hetta kravið og kann vera ein systemiskur trupulleiki.

Eisini var hildið at tað er problematiskt at gera operationellar reglur fyri siðfrøði, har tað serliga við siðfrøði er, at tað krevur reflektiónir og serliga støðutakan og ikki generellar atferðarreglur. Vandin er, at reflektióninar blíva burtur í atferðarreglum. Møguliga er hetta kravið um at konkretisera siðfrøði eitt tekin um, at støðan í ávísum sálafrøðilig økjum kan vera merkt av nógvum siðfrøðiligum tvístøðum, sum kunna slíta og troytta. Hini londin hava ikki merkt hetta kravið um at ítøkiligera ella finna code of conduct fyri siðfrøðiligari spurningum.

**3. dagin**

Varð tikið samanum og tosa um møgulig evnir til næstu norðurlendsku ráðstevnuna hjá etisku nevndunum (Nordic meeting of Ethics boards) sum verður í Íslandi.

Vegna siðsemisnevndina

Ásvør Skaalum og Rigmor Napolensdóttir Arge